# SAVNSFAGNAÐUR 2010

Til **pedagogar** og **lærarar**, ið ansa og undirvísa børnum frá 2 til 11 ár.

## Teknikappingin
### “Eygleið, tekna og gev víðari”

Til **lærarar**, sum undirvísa næmingum frá 12 til 20 ár.

## Filmskappingin
### “Eygleið, filma og gev víðari”

Tá tú vitjar eitt savn, fært tú nakað at vita um mentan, náttúru ella list. Kanska er hetta nýggj vitan hjá tær, men hjá savninum var hetta eisini nýggj vitan einferð. Søvnini eru nevniliga vitanardeplar. Tey skulu finna, varðveita og vísa fram vitan av alskyns slagi. Hvussu koma søvnini fram til hesa vitan?

Ein týdningarmikil partur av vitan kemur við, at tú eygleiðir tað, sum er, og út frá hesum hevur møguleika at skilja eitt samanhang.

Tí er **eygleiðing** vald sum høvuðsevni á Savnsfagnaðinum 2010, tí sjálv eygleiðingin er fyrsta stigið í øllum – eygleiðingin skapar áhuga, áhugin skapar eldhuga, eldhugin skapar nýggja vitan, list og kunnleika. Dømi um og hugskot til eygleiðingarhættir eru á heimasíðuni www.snar.fo/savns-fagnadur. Við hesum kunnu vit tí siga:

## Í fyrstani var eygleiðingin!

**Børn:**
Børn eru av náttúruni eygleiðarar, og tí hava Býarbókasavnið og Savnsfagnaðurin 2010 útskrivað eina teknikapping í felag, har børnum verður givin møguleiki at geva sínar eygleiðingar víðari. Kappingin er fyri børn í aldrinum 2 til 11 ár.

**Ungdómur:**
Fyri at gera ungfólk áhugað í eygleiðing verður her í sambandi við Savnsfagnaðin 2010 útskrivað ein FILMSKAPPING. Kappingin er fyri ung í aldrinum 12-20 ár.

Kappingin er hugsað sum íblástur hjá lærarum í teirra frálæru innan ymsar lærugreinar, sum hava samband við søvn, t.d. náttúruvísindalærugreinar, føroyskt, søga og handaligar lærugreinar.

Hugsanin við hesum tilboði er at veita eitt amboð til næmingarnar at nýta í lærugreinunum. Teir kunnu t.d. gera nýtslu av hesum í skúlanum og síðani senda úrslitið inn til kappingina. Hetta er ætlað sum íblástur og ikki sum eykaarbeiði hjá lærarum. T.d. at gera næmingar varugar við, at teir í náttúru/tøkni kunnu eygleiða hetta ella hatta evnið og teknað tað til kappingina. Møguleiki er sjálvandi hjá áhugaðum lærarum at nýta hetta sum virknan part, og Savnsfagnaðurin er altíð til reiðar at geva kunning, vegleiðing ella hugskot, um tað skuldi gjørst neyðugt.

Hava tit spurningar, so ber til at venda sær til samskiparan fyri Savnsfagnaðinum á tlf. 216596 ella rakel.helmsdal@gmail.com.

Freistin at senda inn er tann 30. september 2010. Kappingarlýsing er viðløgd at býta út til øll børn í viðkomandi aldursbólkum.

Tórshavn 25. august 2010

**Samskipari**
**Rakel Helmsdal**

---

Savnsfagnaðurin 2010 verður fyriskipaður av hesum stovnum:
Náttúrugripasavnið, Jarðfeingi, Sjósavnið, Listasavnið, Fornminnissavnið, Skúlabókagrunnurin og Landsmiðstøðin